# RIMMAR ÙTSØLA

byrjar mánadagin 19. juli kl. 10.00

Øll útsøluvøra
-30% og - 50%

Útvaldar vónarbuksur
- 50%

Ymiskar Pilgrim smykkur
- 50%

20% av øllum tí nýggja

KOM OG GER KVETTIÐ

SONJA DESIGN
Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979


**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar B4.

Á barnadeildini **B4** eru tvey størv leys í skiftandi vaktum at søkja við møguleika fyri lægri brøki enn fyrisett:

- avloysarastarv á starvsbrøki 0,9 frá 1. september 2004 ella avtalu til og við 31. august 2005
- fast fulltíðarstarv frá 1. september 2004 ella eftir avtalu

B4 er ein barnadeild við 13 plássum fyri børnum í aldrinum 0 - 14 ár. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, sjúkrahjálparar, pedagogur og barnalæknar. Áhugaverdar avbjóðingar liggja fyri framman, ætlanin er m.a. at B4 fær betri hølir næsta ár.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan røkt og viðgerð av børnum

**Fyrimun** hava umsøkjarar við klinskum royndum innan økið.

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur við nógvum avbjóðingum

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Tove Thomsen, deildarleiðara, telefon 304500, lokal 6004 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 2. august 2004 kl.12.00.

Skivlig umsókn merkt "umsókn til starv" við CV, avrit av prógvum, autorisatión, viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk*

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Hevur tú hug at læra nakað nýtt?

Enn eru nøkur pláss eftir á útbúgvingunum, sum byrja á Fróðskaparsetrinum í heyst.

Á Føroyamálsdeildini verður tikið upp til B.A.- og M.A.-lestur í føroyskum máli og bókmentum.

Á Náttúruvísindadeildini verður tikið upp til: B.Sc. -lestur í ravmagnsverkfrøði, kolvetnisverkfrøði, jarðalisfrøði, teldufrøði og lívfrøði.

Á Søgu- og Samfelagsdeildini verður tikið upp til hjánám í søgu og stjórnmálafrøði

**Upptøkutreytir**
Fyri at lesa á Fróðskaparsetrinum krevst miðnámsskúlaprógv ella samsvarandi kunnleiki. Til útbúgvingarnar á Náttúruvísindadeildini eru eisini krøv um ávíst støði í fleiri lærugreinum. Kunning um upptøkukrøv til ymsu útbúgvingarnar fæst frá deildini ella á heimasíðuna hjá Fróðskaparsetrinum www.setur.fo

**Umsóknarbløð**
Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni ella við at venda sær til Fróðskaparsetrið. Á heimasíðuni er kunning um útbúgvingarnar.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Fróðskaparsetur Føroya, J. C. Svabos gøtu 14, Postrúm 272, 110 Tórshavn Umsóknarfreistin er *5. august 2004*, tó fyri Søgu- og Samfelagsdeildina *1. august.*

# Frisørsalongin á Høgabóli

Er stongd vegna summarfrí frá 28. juli til 23. august.

**Jógvan Hansen**
Runavík
Tlf. 447575


Sosialurin
www.sosialurin.fo


SKEMMAN

## Søkir skrivstovulærling

Søkt verður eftir skrivstovulærlingi at byrja 1. september 2004.

**Vit bjóða:**
Eitt skiftandi og spennandi arbeiðið, har tú fært ábyrd fyri egnum øki.
Løn sambært galdandi sáttmála við S & K.

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Kunning um Skemmuna:**
Ì Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Ísland, Canada, Letland, Litavia og Estonia. Ì hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Ì dag eru umleið 500 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram á Føroya Handilsskúla.

**Krøv:**
Fyri at gerast skrivstovulærlingur í Skemmuni krevst at tú hevur FHS- ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byrja?**
Tú skalt byrja 1. september 2004.

**Hevur hetta tín áhuga:**
Send so eina skrivliga umsókn innan 24. juli til:

SKEMMAN
Staravegur 7
Postboks 3278
110 Tórshavn
Tel.315588
Mail: skemman@skemman.fo



## TENNISVENJING

Tennisvenjing verður nú aftur hvønn mikudag og fríggjadag
kl. 17.00-18.30 á vallunum í Gundadali. Byrjað verður mikudagin tann 21. juli. Øll eru hjartaliga vælkomin, eisini tey í enn ikki hava teknað seg sum lim. Møguleiki er fyri at lána ketcharar. Eisini er møguligt at bíleggja persónliga venjing hjá Martin Simonsen 271449 og Jón Brekku á 224929.

**Havnar Tennisfelag**



**Landssjúkrahúsið**
100 Tórshavn

# Deildarleiðari til psykatrisku deild 1

## Endurlýsing

Vegna tess, at eingin umsøkjari var til omanfyri nevnda starv, verður hon lýst av nýggjum:

Starvið sum deildarleiðari á Deild 1 á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan 1. august 2004 ella eftir avtalu.

Deildin er ein opin 5-daga psykatrisk móttøkudeild við 14 seingjaplássum. Vit arveiða tvørfakligt á einum høgum fakligum støði við nýggjastu terapihættum. Arbeiðsumhvørvið er áhugavert og hevur nógvar avbjóðingar.

Deildarleiðarin hevur við tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðinginum á psyk. deplinum ábyrgdina av sjúkrarøktini, fíggjarrakstrinum, starvsfólkaleiðslu og menning av deildini.

**Krøv til umsøkjara**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- prógv og royndir innan leiðslu, psykiatriska eftirútbúgving ella líknandi. Sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava ætlanir um víðari útbúgving, kunnu eisini søkja
- hollar royndir og fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkrarøktina
- hava ætlanir um frá læru og menning av starvsfólkum
- góð samstarvsevni
- skal verða sjálvstøð/ur, kreativ/ur og hava visiónir

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri fáast at vita um starvið við at ringja tlf. 304500 til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102 - e-post bergitw@lhs.fo

**Umsóknarfreist** er mánadagin 2. august 2004 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn** merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal senast til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um starv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

Tíðaravmarkað starv

# Kateringleiðari




Við hesum verður eitt starv sum kateringleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins lýst leyst. Starvið er tíðaravmarkað til eitt ár, tó við møguleika fyri at blíva fast starv. Ynskiligt er, at viðkomandi kann byrja skjótast møguligt.

Viðkomandi skal byrja umborð á Smyrli, men kann til eina og hvørja tíð verða fluttur, sum fyriskipað av leiðsluni. Arbeiðs- og vaktarskipanin verður fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein verður settur umborð á.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávan hjá kateringleiðaranum verður at tryggja, at veitt verður fyritøkuni ein úrslitagóð tænasta, herundir samskipan, viðlíkahald og menning av stýringini innan kateringøkið og at tryggja, at bæði manning og ferðafólk verða nøgd við tænastuna.

Kateringleiðarin fær eisini ábyrgdina av, at formligar reglur á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir svara saman við málsetninginum hjá fyritøkuni.

Aðrar høvuðsuppgávur hjá kateringleiðaranum verða at:

- Planleggja og fyriskipa innkeyp av skipsvistum til fyritøkuna.
- Tryggja ein úrslitagóðan rakstur á kateringøkinum.
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar.

**Førleikakrøv**
- Vinnubræv sum hovmeistari ella drúgvar royndir innan økið.
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð.
- Heilsuprógv.
- Sløkkiskeið.
- Teldukunnleiki á brúkarastøði.

Annars rokna vit við, at tú hevur góð samstarvsevni, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert kundavinalig/ur og røkin.

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmáláráðið og Starvsmannafelagið.

Starvið er í lønarflokki 8, sum í løtuni er kr. 24.181,50 um mánaðin í byrjunarløn og 26.239,50 í endaløn. Harumframt verður latin ein viðbot á kr. 1.600,- um mánaðin.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:
*Strandfaraskip Landsins*
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi hósdagin, 22. juli 2004. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Regin Vágadal, rakstrarleiðara, tel 54 30 41 ella e-post: rev@ssl.fo

REPROZ

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

# Hús í Valinum á Tvøroyri



til sølu um hóskandi boð fæst. Húsini eru í sera góðum standi.

**Tlf. 372071/221838**


## DNG.C6000I SNELLUR

**Í juni og juli mánaði geva vit 11% í avsláttri, við keypi av minimum 2 stk.**
**AVMARKAÐ NØGD**



**Fa. Jóannes F. Dahl**, Maskinsmiður,
Tlf: +298 422 274, Fax: +298 422 189, Mobil: +298 221 000,
dam-dahl@post.olivant.fo, 460 Norðskála, Føroyar
UMBOÐ FYRI Vaki-DNG

**Ps: Vit hava eisini tað vælumtókta Dynama nylon 1,1 mm á 250 m. Línuspøl og aðra útgerð til línu**

Sosialurin -tað loysir seg